# Býráðsfundur 24.06.2024

**Býráðsfundur 24.06.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | Avboð |
| | Elin á Torkilsheyggi | Avboð |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 57/2024 – Tímar til Frítíðarskúlan viðv. serligum tørvi | ALMENT |
| Mál nr. 58/2024 – Tímar til Barnagarðin viðv. serligum tørvi | ALMENT |
| Mál nr. 59/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 60/2024 – Uppskot til broyting av byggisamtyktini í Krabbaurð | ALMENT |
| Mál nr. 61/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki – Preben Andersen | ALMENT |
| Mál nr. 62/2024 – Heimild hjá Teknisku nevnd í summarfrítíðini | ALMENT |
| Mál nr. 63/2024 – Umsókn um framleigu av leiguøkið | ALMENT |
| Mal nr. 64/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 65/2024 – Reguleringar til Fíggjarætlanina 2024 | ALMENT |

*Borgarstjórin bað um loyvi at seta eitt mál afturat á skrá. Tað varð einmælt samtykt.*

| | |
|---|---|
| Mál nr. 66/2024 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 57/2024 – Tímar til Frítíðarskúlan viðv. serligum tørvi ALMENT**
J.nr.: 1802-18-2024

Í umsókn dagfest, tann 12.06.2024, søkir leiðarin í Frítíðarskúlanum um eyka stuðulstímar til eitt barn við serligum tørvi. Í verandi løtu gongur barnið í Samsspíranum og hevur stuðul.

Aftaná summarfrítíðina skal barnið í skúla, og avgjørt er, at barnið eisini skal ganga í frítíðarskúlanum 3 tímar um dagin, tilsamans 15 tímar um vikuna. Leiðarin í Frítíðarskúlanum søkir um 15 tímar um vikuna, so hon kann seta ein stuðul til barnið burturav.
Eftir ætlan kemur barnið at hava sama stuðul í Tofta skúla og í Frítíðarskúlanum. Tofta skúli søkir í løtuni eftir fólki við møguleika fyri at viðkomandi eisini verður stuðul í Frítíðarskúlanum.

**Á fundi, tann 17.06.2024, mælir Trivnaðarnevndin til játta 15 tímar um vikuna til serligan tørv í Frítíðarskúlanum.**

**Á fundi, tann 17.06.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og at játta 15 tímar um vikuna. Fíggingin verður tikin av stovninum ”Børn við serligum tørvi”.**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 58/2024 – Tímar til Barnagarðin viðv. serligum tørvi ALMENT**
J.nr.: 1802-17-2024

Í umsókn dagfest, tann 10.06.2024, søkir leiðarin í Barngarðinum um eyka tímar til serligan tørv frá august til desember 2024.

Talan er um tilsamans átta børn við ymiskum tørvi, har leiðarin metir at tað eigur at verða sett eyka inn. Barnagarðurin fekk í fjør játtað 25 tímar um vikuna frá aug23 til jul24 til tvey av børnunum.

Leiðarin søkir um 40t um vikuna. Hann ynskir at seta ein stuðul 30 tímar um vikuna at taka sær av tveimum av børnunum, meðan hinir 10 tímarnir verða deildir út á stovurnar, fyri at geva teimum rúm og tíð at arbeiða miðvíst við børnunum.

**Á fundi, tann 17.06.2024, mælir Trivnaðarnevndin til játta 40 tímar um vikuna til serligan tørv í Barnagarðinum.**

**Á fundi, tann 17.06.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og at játta 40 tímar um vikuna. Fíggingin verður tikin av stovninum ”Børn við serligum tørvi”.**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 60/2024 – Uppskot til broyting av byggisamtyktini í Krabbaurð ALMENT**
J. nr.: 803002-3-2017

Sambært umsóknini frá eigarunum av neystunum í Krabburð um at hækka, broyta og dagføra tey, hevur verið neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið, um ætlanin kann góðkennast av kommununi.

Í verandi løtu loyvir byggisamtyktin hjá Nes kommunu ikki ætlaðu broytingunum av neystunum, tí økið er lagt út sum D øki.

Kommunan er jalig fyri ætlanunum hjá eigarunum um at gera tað møguligt at dagføra neystini – eisini at hækka tey, soleiðis at ovara hæddini eisini verður nýtilig, tí er ætlanin at gera nýggjar ásetingar fyri økið í almennu byggisamtyktini fyri økið.

Mælt verður til at lýsa hesa økisáseting í almennu byggisamtykt kommununnar fyri neystaøkið í Krabburð:

**Uppskot til ásetingar fyri, G2 – Neystaøkið í Krabburð**

a) Økið verður nýtt til neystabygging og smátt havnarlagsvirksemi í hesum sambandi, somuleiðis kunnu neystini nýtast til frítíðarbústað.
b) Bygging ella nýtslutillaging á verandi neystaognum og matriklum, kann bert fara fram í samráð - og eftir ætlan ið byggimyndugleikin frammanundan hevur góðkent.
c) Neystini skulu standa lið um lið, sum neyst og neystaøkir í øldir hava verið hátta – við skjøldrum vendum móti sjónum eins og verandi neyst venda í dag.
d) Neyðugar gøtur kunnu tó verða gjørdar neystanna millum.
e) Neystatekjurnar skulu verða reistar við ‘triðingsreyst’ uml. 42gr – biðjast kann um frávik innan karmin, 30 – 50 gr, um triðingsreising ikki er møgulig byggitøkniliga, ella av aðrari fakgrundaðari orsøk.
f) Neystini og neystaøki í síni heild, skulu verða háttað eins í litið, úttrykki og tilfari – eins og tey upprunaliga hava verið og annars eftir heildarætlan ið byggimyndugleikin frammanundan hevur góðkent.
g) Byggihæddin verður ásett eftir lidnum lendi frammanfyri neystini, og má í mesta lagi vera 6m til yvirgrind og 7,8m til mønu – tó skal hvør samanhangandi neystarekkja hava somu hædd.
h) Víddin á neystunum kann í mesta lagi vera 4x10m, og ongantíð størri enn einstaka stykkið loyvir.
i) Svalar móti sjósíðu, skulu verða frítthangandi (ongar súlur) og ikki hóra meiri enn 1,5m útyvir, við eini min. fríhædd á 2,3m.
Síðufrástøðan móti grannaogn skal í minsta lagi vera ½ av tí ið svalin hórar framúr byggingini.

j) Viðvíkjandi parkeringsviðurskiftum í samband við nýtslu av neystunum verður víst til almennu parkeringsøkini í økinum.

**Á fundi, tann 13.06.2024, mælir Tekniska nevnd til at broyta byggisamtyktina fyri neystaøkið í Krabbaurð til G2 við omanfyrinevndu ásetingum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 61/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki ALMENT**

J.nr.: 1205-9-2022

Í teldubrævi, tann 15.08.2022 søkir Preben Andersen um at fáa uppískoytisstykki longur suðureftir á matr. nr. 341. Umsøkjarin hevur áður fingið játtað uppískoytisstykki á 3m suðureftir, men ynskir nú at leggja meira afturat.

**Á fundi tann 17.08.2022 mælir Tekniska nevnd til at halda fast við teir áður játtaðu 3m.**

Síðani er vorðið greitt, at grannin hevur slept ætlanunum um at fáa uppískoytisstykkið av sama lendi. Í tí sambandi hevur umsøkjarin tí heitt á kommununa um at fáa uppískoytisstykki á 2m og viðgera umsóknina av nýggjum.

Tekniska deild vísir á, at onki er til hindurs fyri at umsøkjarin fær 1m, tilsamans 4m afturat sínum verandi stykki. Tó skal viðmerkjast, at neyðugt er við atkomu til stykki omanfyri, og tí ber ikki til at viðmæla meira enn teir 4m.

**Á fundi, tann 13.06.2024, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla at umsøkjarin fær 1m afturat uppí sítt uppískoytisstykki so at tað tilsamans verður 4m.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 62/2024 – Heimild hjá Teknisku nevnd í summarfrítíðini ALMENT**

J.nr.: 1101-39-2024

Umsitingin mælir til at Tekniska nevnd fær heimild at avgreiða átroðkandi mál í summarfrítíðini.

**Býráðið samtykti einmælt omanfyristandandi tilmæli frá umsitingini.**

# Býráðsfundur 24.06.2024

**Mál nr. 63/2024 – Umsókn um framleigu av leiguøki ALMENT**
J.nr.: 1502-1-2024

Í teldubrævi, tann 06.06.2024, boðar Magni Johannessen frá at MJ Saltsølan steðgar við sínum virksemi í vinnubygninginum á Toftum. Ætlanin er at framleiga bygningin til Sp/f Saltimport, sum fer at hava líknandi virksemi í bygninginum. Eftir ætlan skal felagið yvirtaka leigumál av bygninginum 01.07.2024.

Sambært leigusáttmálanum millum MJ Saltsøluna og Nes kommunu krevst loyvi frá kommununi, um ognin skal framleigast.

Eisini verður boðað frá, at MJ Saltsøla hevur slept ætlanunum um at byggja uppí verandi bygning.

**Á fundi, tann 13.06.2024, mælir Tekniska nevnd til játta at bygningurin verður framleigaður.**

**Á fundi, tann 17.06.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd at góðkenna at bygningurin verður framleigaður undir somu treytum.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 65/2024 – Reguleringar til Fíggjarætlanina 2024 ALMENT**
J.nr.: 1107-4-2024

Viðvíkjandi at flyta játtan til íløgur frá 2023 til 2024 og eykajáttanir.
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið íløgurnar, ið vórðu játtaðar í 2023, men sum ikki blivu nýttar, tí arbeiðið bleiv seinkað, og mælir til, at hesin peningur verður fluttur til 2024, og at hesar eykajáttanir verða gjørdar:

**Flutt frá undanfarna árið:**

| | |
|---|---|
| § 4 Skúlin (Alis- og evnafrøðisstovan) | 500.000 kr. |
| § 6 Vatnveiting (Reinsiverkið) | 500.000 kr. |
| § 7 Havnin (Oyrahavnin) | 5.123.000 kr. |
| **Í alt** | **6.123.000 kr.** |

**Játta eyka íløgur:**

| | |
|---|---|
| § 4 Skúlin | 0 kr. |
| § 6 Vatnveiting (Reinsiverkið) | -450.000 kr. |
| **Í alt** | **-450.000 kr.** |

# Býráðsfundur 24.06.2024

| | |
|---|---|
| **Játta eyka rakstur:** | |
| § 1 Kommunuskrivstovan | 300.000 kr. |
| § 3 Frítíðarskúlin | 66.000 kr. |
| § 5 Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | 70.000 kr. |
| **Í alt** | **456.000 kr.** |

**Fíggjarnevndin mælir sostatt til, at kr. 6.123.000 verða fluttar frá undanfarna ári, kr. -450.000 verða játtaðar eyka til íløgur og kr. 456.000 játtaðar eyka til rakstur, í alt kr. 6.109.000. Upphæddin verður fíggjað við lántøku á kr. 2.000.000 og nýtslu av tøkum peningi á kr. 4.109.000.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**